## Merkið roknskaparskjølini við roknskaparári

Nú ið ársskiftið 2021/2022 er beint fyri stavn, verður heitt á stovnarnar, ið senda gjaldstovuni skjøl at bóka, um at gera gjaldstovuna varuga við, hvørji skjøl skulu bókast á fíggjarárið 2021.

Tá ið farið verður um ársskiftið 2021/2022, verður heitt á stovnarnar, ið senda gjaldstovuni skjøl at bóka, um at eyðmerkja roknskaparskjølini við ávikavist ”2021” og ”2022”.

Er rokning, sum viðvíkur 2022, ljóslisin við ”GL Date” í 2021 – tí fakturadagfestingin er í 2021 – ber til at broyta ”GL Date” til at vera 01-22, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2022. Og umvent - rokning, sum viðvíkur 2021, ljóslisin við ”GL Date” í 2022 – tí fakturadagfestingin er í 2022 – ber til at broyta ”GL Date” til at vera 12-21 ella 13-21, so rokningin kortini verður bókað á fíggjarárið 2021.